# § LÓGLIG VIÐGERÐ AV PERSÓNSUPPLÝSINGUM

## ENDAMÁL

Dátueftirlitið fer sum tað fyrsta at vísa á § 1 í persónsupplýsingalógini, sum ásetur, at

## PERSÓNSUPPLÝSINGALÓGIN § 1

Endamálið við persónsupplýsingalógini er at tryggja persónsvernd hins einstaka, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar, soleiðis at persónsupplýsingar verða viðgjørdar við virðing fyri tí persónliga frælsinum og heimafriðinum og grundað á persónsupplýsingar við høgari góðsku.

Her eru tað serliga ásetingar um persónsvernd, persónligt frælsi og heimafrið, sum dátuábyrgdari skal hava í huga.

## UPPGÁVAN

Tá ið tú fert í hálvt við eina uppgávu, ritgerð ella verkætlan, er tað týdningarmikið at finna útav, um tú í sambandi við uppgávuna viðgerð persónsupplýsingar ella viðkvæmar persónsupplýsingar.

## PERSÓNSUPPLÝSINGAR

### PERSÓNSUPPLÝSINGAR

Persónsupplýsingar eru einhvør upplýsing, sum kann knýtast at einum likamligum persóni, sum t.d. bústaður, telefonnummar, nummarpláta, ip adressa o.s.fr.

Dulnevndar (pseudonymar) upplýsingar, samansettar (aggregeraðar) upplýsingar, bronglaðar (krypteraðar) upplýsingar eru eisini persónsupplýsingar, sum eru fevndar av persónsupplýsingalógini.

Er talan um viðgerð av slíkum upplýsingum, er persónsupplýsingalógin galdandi fyri viðgerðina, og tú hevur sum dátuábyrgdari ábyrgdina av at syrgja fyri, at viðgerðin er í tráð við lóginaviðkvæmar ersónsupplýsingar

### VIÐKVÆMAR PERSÓNSUPPLÝSINGAR

So er tað ein serligur bólkur av persónsupplýsingum, sum nevnast viðkvæmar persónsupplýsingar, tað eru upplýsingar um lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimspekiliga ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagssligt

tilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti.

Er talan um viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum, skal søkjast um loyvi frá Dátueftirlitinum at viðgera viðkvæmar upplýsingar, og loyvi skal vera fingið til vega, áðrenn viðgerðin byrjar. Eru ivamál, um søkjast skal um loyvi ella ikki, ber til at venda sær til Dátueftirlitið.

Oyðublað við umsókn um loyvi at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar er at finna á heimusíðunu hjá Dátueftirlitinum; www.dat.fo

## LÓGLIG VIÐGERÐ

Øll lóglig viðgerð av persónsupplýsingum krevur heimildargrundarlag, og at viðgerðin er í tráð við persónsupplýsingalógina og tær reglur, sum er settar í gildi sambært lógini.

## SAMTYKKI

Heimildargrundarlagið er vanliga samtykki, og dátuábyrgdari skal syrgja fyri, at samtykki verður givið á rættan hátt. Samtykki er eitt sjálvboðið, nágreiniligt og kunnað viljaboð frá skrásetta um, at upplýsingar um ein sjálvan kunnu viðgerast. Hetta merkir m.a., at viðkomandi skal kunna yvirskoða og skilja støðuna, børn undir 18 ár, dement og onnur, sum ikki hava fult vit, kunnu ikki geva eitt fullgott samtykki sambært lógini. Áðrenn samtykki kann gevast á fullgóðan hátt, skal viðkomandi eisini vera vitandi um, at samtykki kann takast aftur, og at persónsupplýsingarnar um viðkomandi í hesum sambandi verða strikaðar.

## TRYGD

Dátuabyrgdari skal ansa eftir, at viðgerðin er lóglig sambært persónsupplýsingalógini og trygdarkunngerðini. Og dátuábyrgdari skal syrgja fyri, at nøktandi trygdartiltøk eru í gildið í sambandi við viðgerðina. Tað er:

Fyriskipanarlig trygd

- Dátuábyrgdari hevur ábyrgd av at skipa persónsupplýsingakervið og atgongd hertil, gera dátuviðgerðaravtalur og skipa viðgerðina frá byrjan til enda.

Fysisk trygd

- Dátuebyrgdari hevur ábyrgd av, at persónsupplýsingarnar liggja í tryggari legu; at teldur, tól, geymar, diktafon o.t.

stendur trygt, har óviðkomandi ikki hava atgongd við m.a. læstum skápi, kontóri, girðing, skerm fyri telduna o.s.fr.

Teknisk trygd

- Dátuábyrgdari hevur ábyrg av at seta í verk trygdartiltøk sum loyniorð, logg, brongling í sambandi við flutning, trygdareintøk, verjugarðar (firewalls) o.s.fr.

## UMSÓKN OG LOYVI

Øll lóglig viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum krevur loyvi frá Dátueftirlitinum, og loyvið skal vera fingið til vega, áðrenn viðgerðin byrjar.

## VIÐKOMANDI SKJØL

Saman við umsókninini skal dátuábyrgdari senda við:

- Heimildargrundarlagið (avrit av samtykkiskjalinum)

- Mannagongdir um trygd í sambandi við viðgerðina av viðkvomu persónsupplýsingunum

- Viðkomandi dátuviðgerðaravtalur og aðrar viðkomandi avtalur.loyvi

Loyvið frá Dátueftirlitinum at viðgera persónsupplýsingar verður altíð givið við ávísum treytum og almennum treytum.

Verða treytirnar ikki hildnar, kann Dátueftirlitið taka loyvi aftur.

Dátueftirlitið kann til eina og hvørja tíð steðga viðgerð, sum ikki er í tráð við persónsupplýsingalógina.

Dátueftirlitið, Tórshavn 19. mars 2019